Lesarabrøv

Nakað um ferðatrygging í Føroyum

Sum sæst av yvirlitinum, mugu vit, ið búgva her á klettunum, gjalda umleið 3 ferðir meira til trygging okkara enn t.d. føroyingar, ið búgva í Danmark, um vit fara út um landoddarnar at ferðast. Tryggingartreytirnar eru annars mestsum tær somu. Tað er sama meginfelag, nevniliga »Europæiske Rejseforsikring A/S«, ið trygging okkara umboðar her á landi.

Feitur man einkarrættur tryggingarsambandsins roynast teimum, vanliga føroyinginum til ógagns.

Hvat sigur prísráðið, ella finst nakað slíkt?

Eiko Apol

TRYGG FERÐ - FERÐATRYGGINGIN

Á ferðum í	1F Norðurlondum	2F Bretlandi	3F Evropa	4F Allur heimurin
Sjúka	* ikki tryggjað	**150.000	500.000	1.000.000
Flutningur heim	óavmarkað	óavmarkað	óavmarkað	óavmarkað
Fylgi við sjúking/boðsending	3 fólk	3 fólk	3 fólk	3 fólk
Ferðaslit/heimkallan	óavmarkað	óavmarkað	óavmarkað	óavmarkað
Endurgjaldsferð*** - 2 nyggjar ferðir + børn	25.000	25.000	25.000	50.000
Viðtøri (kann hækkast)	10.000	10.000	10.000	10.000
Ov seint framkomin á allari útferðini	10.000	10.000	10.000	15.000
Heimferðarseinkan	1.000	1.000	1.000	1.000
Rættarhjálp	75.000	75.000	75.000	75.000
Álop	500.000	500.000	500.000	500.000
Vanlukka: Deyði (kann hækkast)	100.000	100.000	100.000	100.000
–Avlami (kann hækkast)	200.000	200.000	200.000	200.000
Ábyrgd: Mannskaði	5.000.000	5.000.000	5.000.000	5.000.000
– Skaði á lutir	2.000.000	2.000.000	2.000.000	2.000.000

* Kemur undir norðurlendsku samstarvsavtaluna við sjálvsábyrgd
** bert læknarokningar o.l.
*** bert galdandi fyri í mesta lagi 32 daga ferðir

TRYGGINGARGJØLD Í KRÓNUM FYRI HVØNN

6 dagar	106	140	319	673
11 dagar	138	182	414	875
18 dagar	173	228	518	1 102
25 dagar	213	280	638	1 345
32 dagar	242	319	725	1 535
eftirfylgjandi vika	55	75	170	320
eftirfylgjandi mánaði	200	280	650	1 200

VIRKNIS-ISKOYTI

FERIE REJSEFORSIKRING

BASIS-dækning	i EUROPA		i HELE VERDEN	
Forsikringens omfang pr. person	1 PLUS	2 BUDGET	3 PLUS	4 BUDGET
Rejsesyge			1.000.000 kr.	500.000 kr.
Hjemtransport	X		Ubegrænset	Ubegrænset
Sygeledsagelse/Tilkaldelse	3 personer	1 person	3 personer	1 person
Hjemkaldelse	Ubegrænset	20.000 kr.	Ubegrænset	40.000 kr.
Erstatningsrejse - 2 nye rejser/fam.dækn.	25.000 kr.	××× dækket	50.000 kr.	Ikke dækket
Erstatningsrejse - 1 ny rejse		10.000 kr.		20.000 kr.
Bagage	10.000 kr.	2.500 kr.	10.000 kr.	2.500 kr.
Forsinket fremmøde på hjemrejsen	10.000 kr.	××× dækket	15.000 kr.	Ikke dækket
Forsinket fremmøde på udrejsen		5.000 kr.		10.000 kr.
Overfald	500.000 kr.	250.000 kr.	500.000 kr.	250.000 kr.
Rejseliv: Invaliditet	200.000 kr.	××× dækket	200.000 kr.	Ikke dækket
(inkl. ulykke) Død	100.000 kr.	××× dækket	100.000 kr.	Ikke dækket
Ulykke: Invaliditet		200.000 kr.		200.000 kr.
Død		100.000 kr.		100.000 kr.
Privatansvar: Personskade	5.000.000 kr.	5.000.000 kr.	5.000.000 kr.	5.000.000 kr.
Tingskade	2.000.000 kr.	2.000.000 kr.	2.000.000 kr.	2.000.000 kr.
Retshjælp	75.000 kr.	75.000 kr.	75.000 kr.	75.000 kr.
Varighed	**Præmie kr.**	**Præmie kr.**	**Præmie kr.**	**Præmie kr.**
5 dage	88	44	554	378
10 dage	128	66	718	466
17 dage	168	88	988	562
23 dage	206	106	1.186	678
1 måned	248	128	1.262	742

Høgrumegin er eitt yvirlit yvir tariffir hjá donskum borgarum, eina dýrari og eina bíligari at velja í. Vit hava valt ta dýraru, 1 plus-Europa, til samanberingar. Smbr. hesum skulu føroyingar í Føroyum gjalda 300% meira fyri tað stytsta dagatalið. Fyri longsta, 30 dagar, skulu vit gjalda 274% meira.

Tryggingarsambandið átti at komið við eini fullgóðari frágreiðing, hvi hesi stóri mismunur er íkomin.

Í Sosialinum leygardagin 17. januar vísir Eiko Apol á at føroyingar, **búsettir** í Danmark sleppa lættari, tá teir og onnur, ið búgva í Danmark, fara suður gjøgnum Evropa at ferðast.

Hetta er fullkomiliga rætt, tí á hinu síðuni á sama faldara, ið vit heita á blaðið at endurgeva, stendur m.a.:

Gevið gætur!
Í donsku ferðaskráunum og teirra »Europæiske« ferðatryggingum, sum einans eru galdandi fyri fólk við føstum bústaði í danskari kommunu, verður víst til »Det gule sygesikringskort«, sum rindar fyri sjúkra- og heimflutningsútreiðslur, tá danir ferðast suðuri í Evropa styttri enn 30 dagar, og talan ikki er um arbeiðsørindi. – Ein sjúkratryggingarskipan, ið kostar donsku kommununum um 100 milj. árliga. **Henda skipan er ikki galdandi fyri okkum føroyingar og onnur, sum búgva í Føroyum.**

Í føroysku ferðatryggingunum er neyðuga galdið fyri sjúkra- og heimflutningstryggingina íroknað tryggingargjaldinum við 250 til 350 krónur fyri hvønn ferðandi á ferðum suður í Evropa. Ein útreiðsla, sum ávirkar prísin nógv, men ikki slepst undan.

Sostatt kunnu danska og føroyska ferðatryggingin ikki samanberast, tí tað áliggur tí føroysku at rinda nógvar ferðir meira enn tí donsku. Talan er ikki einans tær útreiðslurnar, sum donsku kommunurnar rinda fyri oman fyri nevndu 100 miljónum fyri teirra borgarar.

Sum dømi kunnu vit nevna:

Ein dani verður álvarsliga sjúkur onkunstaðni við Miðjarðarhavið. Neyðugt verður at lækni ella sjúkrasystir fer úr Danmark og fylgir sjúklinginum til Danmarkar. Danska kommunan rindar allan kostnaðin.

Føroyingur, búsitandi í Føroyum, kemur í somu støðu og lækni ella sjúkrasystir fer úr Danmark suður eftir sjúklinginum fyri at fylgja sjúklinginum allan vegin til Føroya. Síðani skal viðkomandi aftur til Danmarkar. Føroyska ferðatryggingin rindar allar **sjúkrahús- og viðgerðarútreiðslurnar** umframt allar **flutningsútreiðslurnar** ofta fyri einar 10 flogferðaseðlar, tí umframt sjúklingin á **børu** verður goldið fyri hjúnafelagin og børnini, so hesi kunnu fylgjast heim við sjúklinginum.

Lesarabrævið hjá Eiko Apol gevur okkum høvi – betri enn nøkur lýsing ella faldari – at greiða frá oman fyri nevndu viðurskiftum. Vónandi verða tað framyvir færri ferðandi úr Føroyum, sum koma illa fyri við at rokna við, at donsku ferðatryggingarnar fata um »Sygdom og Hjemtransport«, tí tað gera tær **ikki**. Avritið niðanfyri vísir týðuliga, at donsku ferðatryggingarnar ikki hava tikið »Sygdom og Hjemtransport« við tá talan er um ferðir í Evropa.

Annars umboðar Tryggingarsambandið Føroyar ikki Europæiske Rejseforsikring A/S, men meira vaktarstovu EURO ALARM umboðar okkum og tekur sær av okkara ferðandi viðskiftafólkum, tá hesi hava brúk fyri skjótar hjálp uttanlands. Somu tænastur gera teir fyri hini norðurlondini, og er tað ein fyrimunur, at tryggingartreytirnar eru so einsljóðandi sum gjørligt, sjálvt um **almennu veitingarnar** á hesum øki eru ymiskar.

Vinarliga,
Tryggingarsambandið Føroyar

FERIE REJSEFORSIKRING

BASIS-DÆKNING I EUROPA	1	2
Forsikringens omfang pr. person	**PLUS**	**BUDGET**
Sygeledsagelse/Tilkaldelse	3 personer	1 person
Hjemkaldelse	Ubegrænset	20.000 kr.
Erstatningsrejse - 2 nye rejser/fam.dækn.	25.000 kr.	Ikke dækket
Erstatningsrejse - 1 ny rejse		10.000 kr.
Bagage	10.000 kr.	2.500 kr.

BASIS-DÆKNING I HELE VERDEN	3	4
Forsikringens omfang pr. person	**PLUS**	**BUDGET**
Rejsesyge	1.000.000 kr.	500.000 kr.
Hjemtransport	Ubegrænset	Ubegrænset
Sygeledsagelse/Tilkaldelse	3 personer	1 person
Hjemkaldelse	Ubegrænset	40.000 kr.
Erstatningsrejse - 2 nye rejser/fam.dækn.	50.000 kr.	Ikke dækket
Erstatningsrejse - 1 ny rejse		20.000 kr.
Bagage	10.000 kr.	2.500 kr.



Tíðindaskriv

Ljós ímóti depressjónum

Er tað eitt sindur ringt at koma úr songini um morgunin? Ert tú sum heild í verri lag og hevur tú eina ótemjandi trongd til kakur, ís og sjokolátu?. Rólig – tað hevur sína náttúrligu frágreiðing. Tað er jú kalt – og myrkt!

Tørvur á ljósi – ið er sterkari enn ljósið ein gráan vetrardag ella innandura ljós – er júst vanligasta orsøkin til at vit verða rakt av vetrartyngd – ella Seasonal Affective Disorder, sum er læknaliga heitið á eini rættiligari vetrardepressjón.

Skulu vit kenna okkum væl bæði kropsliga og sálarliga, skulu vit vera í antin 2500 lux (mátieindin fyri ljósstyrki) í 2–3 tímar, 5000 lux í 1 tíma ella 10.000 lux í ein hálvan tíma – hvønn dag! Ein góðan summardag, tá ið sólin skínur, er eingin vandi, tí tá er ljósstyrkin úti millum 10.000 og 100.000 lux. Men ein dag, har tað er skýggjað, eru bara uml. 1000 lux uttandura, upplýsir finski SAD-granskarin, Timo Partonen, dr. med. – við vetrardepressjónum og dagsljós-viðgerð sum sergrein.

Dagsljós-viðgerð er ein viðgerð, har sjúklingurin situr í sterkum ljósi í tveir tímar dagliga í eina tíð. Hesa viðgerð kanst tú nú fáa heima við hús. Philips hevur framleitt eina lampu, »Bright Light«, sum kann brúkast allastaðni heima. Lampan fæst hjá Elding í SMS, sniðið er einfalt og tíðarleyst, lampan hevur ljósdoyvara, soleiðis at hon eisini kann brúkast til vanligt ljós – og prísurin liggur um 4.000,- kr.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr.
P/f 330, P/F Hølið, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
08.11.1997.

Kapitalur:
Hækking við
kr. 137.000,00
til kr. 662.000,00.
Flokkar: A kr. 277.000,00 og B kr. 385.000,00.
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 137.000,00 til kurs 100.
Flokkar: A kr. 62.000,00 og B kr. 75.000,00.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Ísak Niklásarson Jacobsen, Smærugøta 16 A, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Bjørgheðin Jacobsen, 438 Langasandur.

Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av tveimum nevndarlimum.

Skráseting Føroya
tann 19. januar 1998

Kristin Balle